# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Lorensa í Selvindi
### 30. juni 1948 - 26.11.2006
### In memoriam



*Nú rekur tungt um Raktanga,*
*kalt strýkur lot um hógv,*
*nú syrgin Selvindsbrekku ganga*
*øll tey, sum gleddust her so nógv.*

*Vit fata lítið langnuleik*
*í lívsins loynda talvi,*
*nú frúgvin fall, og styrkin sveik,*
*og burt svann lívsins alvi.*

*Lorensa, tú oss øllum var*
*eitt ljós á lívsins gøtu,*
*sum altíð okkum blíðskap bar*
*og gylti manga løtu.*

*So still tú lívsins lagnu tók,*
*nú sjálv tú stóðst for happi,*
*nú sóttin vonda mót tær ók,*
*tú stóðst sum avrekskappi.*

*Tú vísti oss at styrki bar*
*í kærleiksfyltum heimi,*
*har móðuralskur meira var,*
*enn glóð í grúgvueimi.*

*Tú vísti oss, at vinalag*
*við gulli verður spunnið*
*so við og við hvønn virknan dag,*
*sum lívsskeið verður runnið.*

*Tú vart so stútt og stór í sinn,*
*so skær á tínum staði,*
*at øll sum komu til tín inn,*
*tey kendu vinalagið.*

*Tú vinur okkar alra var*
*við húsi tínum øllum,*
*nú andi tín mót hæddum bar*
*til heim í Himna høllum.*

*Lorensa, vit tær siga takk*
*for alt, tú okkum lærdi,*
*at vinarlag títt okkum rakk,*
*so leingi lív títt vardi.*

*Tó hús títt enn vit eiga kært*
*við øllum tínum kæru,*
*har vinalag vit fingu lært*
*við tíni góðu læru.*

*Vit goyma teg sum dýran skatt*
*í okkar innsta minni,*
*og minnast teg, tá lív var lætt*
*í tíni stovu inni*

*Títt lív for okkum glæma er,*
*sum ikki hvørva skal,*
*tí øll vit siga, nú tú fer,*
*at alt, tú var, var væl.*

**Unna & Petur Martin**

# Birgur og lívsknáur útiseti farin um *hálvfjers*

## *Alroyndur kosmopolittur*

Sunnudagin 3. december fylti vælkendi útisetin og tvørámaðurin, *Bjarki Olsen* 70 ár. Foreldrini vóru mentaði fólk, og Bjarki vaks upp í musiskt-intellektuellum umhvørvi. *Mamman*, Olga var av Tvøroyri, men hevði norskar røtur. *Pápin*, Jákup var ættaður úr Sandavági, men kom sum heilt ungur lærari at arbeiða við Tvøroyrar skúla, har hann fekk sítt lívsyrki í væl meira enn ein mansaldur.

Bert 16 ára gamal fór Bjarki úr sínum tryggu barnakorum við restini av konfirmatiónspengunum og heilt feskum realprógvi sum viðføri til Noregs, og haðani á cyklu víðari til Danmarkar, har hann ætlaði sær útbúgving. Hann kom næstan alt fyri eitt í læru sum radiomekanikari í Kjøpinhavn. Tað var dreymur hansara at gerast radioteknikari, - hetta eydnaðist, og hann hevur trivist óføra væl í Kjøpinhavn síðani.

Hann arbeiddi á heimskendu verksmiðjuni *Radiometer*, sum enn liggur í Emdrup í útnyrðingspartinum av Kjøpinhavn. Hann specialiseraði seg í røntgen-tólum og fekk sær so holla eftirútbúgving, bæði í Danmark og útlondum, at hann í 1966 fekk prógv sum verkfrøðingur.

Kunnleiki hansara í røntgen-teknikki og aðrari elektróniskari hospitalsprojektering førdi við sær, at hann fekk ein stóran part av verðini sum arbeiðspláss. Hann hevur arbeitt nógv í teimum arabisku londunum, í Amerika og ikki minst í Týsklandi, Italien og Svøríki. Eitt stutt skifti arbeiddi hann á Loran-støðini á Eiði.

Bjarki gjørdist brátt habilur heimsborgari, men globala basan bleiv við at vera Kjøpinhavn, har hann hevði sítt býli, konu og børn. Hann hevði eftir tátíðar-mátistokki stóra inntøku og gjørdist heilt skjótt múgvandi maður.

Tað er tó vandi í hvørjari vælferð. Síðst í 1970´unum fekk Bjarki álvarsama sjúku, sum hann ófatuliga heroiskt hevur stríðst við síðani. Tað intensiva og krevjandi røntgen-arbeiðið kann vera orsøk til, at Bjarki fekk sítt heilsubrek, men í hansara lívskáta lyndi er ikki pláss fyri beiskleika, og tí hevur hann heldur ikki gramt seg um sína hørðu lagnu. Hann er ikki typan, sum fellir í fátt.

Í staðin fyri hevur hann við síni ótrúligu mentalu avlopsmegi rationelt analyserað og diagnosticerað sína medicinsku støðu og roynt allar hugsandi og praktiskt ótraditionellar leiðir, bæði teknisktkirurgiskt, radiologiskt og kemiskt til at finna sær heilsubót. Hann er so vælkendur í danska læknaheiminum, at hann er uppá fornavn við nógvar av Danmarkar allarkønastu dugnamonnum innan bæði kirurgi, radiologi og medicin.

Hann hevur ligið á einum ótali av donskum sjúkrahúsum, Ríkishospitalinum, Frederiksberg hospitali, Hillerød amtssjúkrahúsi, Glostrup amtssjúkrahúsi fyri bert at nevna nøkur, og allastaðni er hann persónliga væl við yvirlæknarnar, sum fagna honum sum stinnum stríðsmanni og óvanliga stálsettum sjúklingi. Hann hugtekur læknarnar við sínum seiga treiskni og



stríðshuga. Teir hava viðgjørt Bjarka í so nógv ár, at teir næstan sleppa honum uppí sjálva planleggingina av tí aktuella kurinum, og teir eru so ovfarnir av hansara analytisku tilgongd til viðgerðina, at teir beinleiðis ráðføra seg við Bjarka um kompliceraði teknisk snildi í sjálvari operatiónini.

Hvussu ofta Bjarki tilsamans hevur verið á operatiónsborðinum, veit eg ikki, men tað eru meira enn sjey ár síðani, at hann fortaldi, at hann, umframt aðra viðgerð, hevði verið undir skurði 17 ferðir, og hann hevur verið innlagdur ótaldar ferðir, síðani tá.

Annars fekk Bjarki sína debut sum hospitalspatientur longu sum hálvvaksin smádrongur, tá ið hann kom at liggja á sjúkrahúsinum í Havn í heilar átta mánaðir, tí hann var farin í pettir, av eini hættisligari sleðuskreiðing móti einum bili í eini brattari Tvøroyrarbrekku. Kanska er tað haðani, hann hevur fingið sína mentalu styrki til seinni hospitalsavbjóðingar.

### Leikum fagurt á foldum…

Tey lívskor, sum Bjarki hevur fingið at berjast við, høvdu fingið tey allarflestu til at missa mótið og tað sociala áræðið. Men soleiðis er ikki við Bjarka - tvørturímóti. Hann hevur, líka síðani sjúkan noyddi hann burtur av arbeiðsmarknaðinum, luttikið sum andilig kempa í alskyns socialum aktivitetum, bæði donskum og føroyskum. T.d. hevur hann avrikað stórt arbeiði í meinigheitsráðnum við Brønshøj kirkju, har hann hevur verið limur í nógv ár. Hann hevur verið eitt av teimum allarhollastu álitisfólkunum í *Føroyahúsinum* (í køkinum, við diskin ella við dyrnar), har hann hevur hjálpt til við alskyns høvi. Hann hevur eisini ofta staðið fyri musikalskum undirhaldi - hann er jú rutineraður pianistur.

Hann hevur verið fastur fúsur í *Neystinum*, har hann enntá, hóast sítt heilsubrek, róði kapp við eini oldboysmanning. Seinni hevur hann luttikið dúgliga í felagsskapinum *Bátsmanningini*, sum heldur til í Nordhavn. Eina tíð, síðst í 90´unum kýtti hann seg sum cyklistur, t.d. cyklaði hann fleiri ferðir líka úr Brønshøj og suður til Ishøj, har *Neystið* liggur. ( Hetta er eitt roysni, sjálvt hjá heilt frískum manni..)

Vertsskapsmaður og skemtari er Bjarki burturav – tá ið til ber, er hann at síggja í flestu føroysku feløgum, og hann er oftast millum teir síðstu skemtararnar, sum fara til hús. Hann spælir, hann syngur og skemtar til síðsta mann. Honum dámar eisini væl at ferðast, ikki minst til europeiskar stórbýir, og hann veit eina ótrúliga rúgvu av kultursøgu úr flestu europeisku metropolum.

Føroyingafelag skipaði síðst í 90´unum fyri eini ferð til Berlin – har var Bjarki millum teir fremstu, sum minutiøst granskaðu tann dynamiska týska høvuðsstaðin. Á Potsdamer Platz, sum tá enn var eitt risastórt byggipláss, var Bjarki ovast uppi í einum av teimum fyribils sýnistornunum og setti føroyskan trumf á við at fáa sær turran fisk og spik høgt omanfyri tað centrala Berlin.

Í tí elegantu salonini í *Grand hotel* á Friedrichsstrasse setti hann seg beinanvegin við flyglið at undirhalda, og varð sera væl fagnaður.

Óførur frásøgumaður er Bjarki eisini. Tað gav at bíta, tá ið hann í Føroyahúsinum stutt eftir nýggjár í 2001 greiddi frá sínum turbulenta og spennandi lívi. Fólk roknaðu við einum fyrilestri uppá smá trý korter – men tá ið meira enn tríggir tímar vóru farnir, sótu vit enn sum undir lestri, og eingin vildi heim. Hann endaði kvøldið við eminentum klaverspælið. Slíkt er lívskunstur!.

Tað var m.a. tá, hann fortaldi um tann sjáldsama hugnaliga býin **Freiburg**, har hann búði og arbeiddi í fleiri umførum. Honum dámdi stakvæl býin og gloymdi aldri hesa kulturperlu við Rínánna. Viðhvørt át hann eksklusivan døgurða fronsku megin Rhinen í býnum **Colmar**, men annars fekk hann sær ta andiligu føðina týsku megin ánna í sjálvum Freiburg. Henda býin hevur hann ofta vitjað seinni av nostalgiskum grundum sum vitalur globetrottari. *At ferðast er at liva*, helt H.C.Andersen fyri og Bjarki *vil* liva, ikki bara yvirliva; tí ferðast hann so dúgliga.

Líka síðani hann sum *bara* trettan ára gamal spældi swing, jitterbug og jazz (við serligari dispensatión frá Elgerdu Jacobsen í skúlanum) til dansin í Tvøroyrar klubba, og til hann nú spælir skikkiligar jólasálmar í Føroyahúsinum, so hevur Bjarki altíð verið tann alfúsi entertainarin og tann passioneraði veitslumaðurin. Eingin kann belæra Bjarka um lívskvalitet.

Hann hevur ríkað tað sociala lívið hjá útisetum, og vit hava øll lært ótrúliga nógv av honum. Tvøroyrar bygd kann vera errin av at hava fostrað slíkan úrmæling. Bjarki dugir nógv betri enn tey allarflestu at liva eftir devisuni: ***Leikum fagurt á foldum – eingin treður dansin undir moldum!***

Hjartaliga tillukku!

**Virgar T. Dalsgaard**